

Stjórin á ONS er fyrrverandi borgarstjórin í Stavanger, sum her vitjar á føroyska básinum í 2012. Myndatøka Jan Müller/oljan.fo

# Føroyar við á altjóða oljumessu í Stavanger

**Jan Müller**

17.03.2014 - 11:42

Oljan.fo

**Føroyskur landabásur á Offshore Northern Seas 2014 – melda til hesa vikuna**

Stóra oljumessan í Stavanger, Offshore Northern Seas (ONS,) verður í døgunum 25. – 28. august.

Vanligt hevur verið, at føroysk vinna hevur verið saman á einum felags føroyskum landabási, og eisini í 2014 verður skipað fyri føroyskum landabási á ONS.

Hesuferð er tað tó Oljuvinnufelagið og ikki Løgmansskrivstovan, sum samskipar luttøkuna. Á føroyska landabásinum á oljumessuni í Aberdeen í 2013 luttóku 18 føroyskar fyritøkur og myndugleikar. Fleiri av hesum hava longu meldað til oljumessuna í Stavanger í ár.

Fyritøkur, sum ikki longu hava meldað til, og sum ætla at verða partur av føroyska landabásinum, skulu melda hesa vikuna til hjá Esther Dahl áesther@industry.fo ella hjá Ólavi í Geil á olavur@aem.com.